## Landsliðið til Århus

Danska fótbóltslandsliðið fer næsta summar at spæla vinardyst ímóti Írlandi sum fyrireiking til avgerandi EM-dystirnar um heystið. Danska fótbóltssambandið hevur gjørt av, at hesin dysturin verður ikki spældur í Parkini í Keypmannahavn.

- Vit spæla fimm landsdystir í Parkini næsta ár, og tí hildu vit tað var natúrligt at leggja dystin ímóti Írlandi onkra aðrastaðni, og valið stóð ímillum Århus, Odense og Herning, sigur Lars Berendt, aðalskrivari í DBU.

Landsdystur millum Danmark og Írland verður spældur 22. august næsta ár.

## Wenger keypir ikki meira



Hóast úrslitini hjá Arsenal hava verið misjøvn í Premier League í ár, so ætlar venjarin, Arsene Wenger, ikki at styrkja hópin, tá ið feløgini aftur hava kjans at keypa spælarar í januar mánaði.

- Vit keypa ikki fleiri spælarar í hesum kappingarárinum. Hesin hópurin skal spæla kappingarárið liðugt, sigur Arsene Wenger.

Hann hevur annars verið undir trýsti frá fleiri fyri at styrkja liðið. Millum annað skal liðformaðurn, Thierry Henry, hava roynt at sannføra Wenger um, at liðið má styrkjast.

Dráttur-KÍF 3-2 (18-25, 25-18, 24-26, 25-16, 15-13)

# Dráttur aftur á røttu kós



*Dráttur er komið aftur á røttu kós í meistaradeildini hjá kvinnum. Tað leikaði tó hart á ímóti KÍF, sum var um reppið at taka bæði stigini við til Kollafjarðar*

**Eftir tvey tap á rað eydnaðist aftur Drátti at vinna í meistaradeildini hjá kvinnum. Tað leikaði tó hart á hjá oddaliðnum, tá KÍF vitjaði á Giljanesi.**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Dráttur skuldi royna at koma aftur á røttu kós í meistaradeildini hjá kvinnum, tá KÍF vitjaði á Giljanesi. Dráttur hevur ligið heilt frammi í oddinum at kalla alt árið, men síðstu tveir dystirnar var tað blivið til tvey tap á rað hjá oddaliðnum. Tí skuldu tær fáa liðið í gongd aftur.

Hjá KÍF hevur gingið betur síðstu dystirnar. Eftir sjey tap á rað eydnaðist teimum at vinna á Mjølnir seinast, og tí hevði teirra sjálválit fingið eitt slag rætta vegin. Tí var lagt upp til ein spennandi dyst á Giljanesi leygardagin.

### Vunnu eitt sett í part

At sjálválitið hjá Drátti ikki var heilt í topp sást væl í fyrsta setti. Her fylgdust liðini væl fyrstu løtuna, og mitt í settinum stóð á jøvnum 13-13. So vann KÍF tó fim bóltar á rað, og nú var støðan knappliga 13-18 til kollfirðingar. Dráttur royndi at kempa seg aftur í settið, men her vóru KÍf ov sterkar. Tær vunnu nevniliga fyrsta settið 18-25. Serliga móttøkurnar hjá KÍF vóru góðar í fyrsta settið, og Dráttur hevði til tíðir stórar trupulleikar at fáa bóltarnar niður í gólvið hjá KÍF.

Í øðrum setti var tó vent í holuni. Her legði Dráttur fyri sum eitt ódnarveður, og tær førdu beinanvegin 8-3. Her var týðiligt, at Dráttur ætlaði sær hetta settið, og løtu seinni høvdu tær økt um leiðsluna upp í 16-7. Nú var settið í roynd og veru avgjørt, og KÍF megnaði heldur ikki at fáa Drátt aftur. Endaliga úrslitið av øðrum setti gjørdist 25-18 til heimaliðið. Hetta settið var spælið hjá Drátti nógv meir fjølbroytt, og nú megnaðu tær eisini at sláa bóltarnar í gólvið hjá KÍF.

### KÍF nærkaðist sigrinum

Triðja settið byrjaði ógvuliga javnt, og liðini fylgdust upp til 8-8. So tók KÍF sær tó um reiggj og legði seg á odda 8-12. Løtu seinni høvdu tær økt um leiðsluna upp í 10-17, og nú sá út til, at kollfirðingar eisini fóru at vinna tirðja sett. So byrjaði Dráttur tó eitt flott come-back, og fáar bóltar seinni hevði heimaliðið lagt seg á odda 20-19. Nú sá ikki gott út hjá KÍF, men leikararnir blivu við at kempa, og móti endanum av settinum stóð á jøvnum 23-23. So tók KÍF tó eitt ordans hál til síðst, og endaliga úrslitið gjørdist 24-26.

Nú hevði KÍf lagt seg á odda 1-2, og ein óvæntaður sigur lá og lúrdi. Hjá Drátti lá triðji ósigurin á rað líka sum í luftinu, og um tær ikki vunnu síðstu tvey settini, so gjørdist hetta til veruleika.

### Dráttur vendi dystinum

Men í fjóðra setti fann Dráttur aftur rætta spælið fram. Tær løgdu hart út, og ikki gekk log tíð, áðrenn tær høvdu lagt seg á odda 9-4. Hesa leiðslu bara økti Dráttur um, og løtu seinni visti talvan 18-7 til heimaliðið. Hetta settið var nú so gott sum avgjørt, og úrslitið av fjórða setti gjørdist 25-16 til Drátt. Nú skuldi ein altavgernadi janbrótari til fyri at finna ein vinnara.

Her tóktist Dráttur sterkari, og mitt í settinum førdu tær 9-6. Løtu seinni høvdu tær øktu um leiðsluna til 13-9, og nú tóktist sigurin skula fara til Vágarnar. Men so tók KÍf eitt ordiligt hál. Tær vunnu nevniliga fýra bóltar á rað, og nú stóð á jøvnum 13-13, og knappliga var KÍf heldur oman á. So hevði Dráttur tó fingið nokk, og tær vunnu síðstu tveir bóltarnar, og sostatt vann Dráttur henda spennandi dystin 3-2.

Við sigrinum hevur Dráttur fingið gongd á aftur spælið, meðan KÍF mátti taka til takkar við sínum fjórða tapi í ár eftir javnbrótara.

## Helgi og Uni ov stuttir

Tað eydnaðist ikki fimleikafelagnum Gefion, har Helgi W. Olsen er venjari, at vinna donsku 2. deild í fimleiki, tá teir leygardagin dystaðust móti Nakskov fyri aðru ferð.

Nakskov vann fyrra dystin tepurt, men ætlandi skuldi Gefion verið betri mannað leygardagin, enn teir vóru tað ta ferðina.

Hetta eydnaðist tó ikki. Stutt undan dystinum máttu tveir av fimleikarunum geva avboð - teirra millum Uni Mikkelsen úr Klaksvík - og so skuldi tað verða tungt.

Hóast mannfallið endaði kappingin tó aftur hesaferð sera jøvn, og tá ið avtornaði, gjørdist Nakskov endaligi vinnarin við 322,00 stigum. Gefin fekk 319,80 stig. Hetta er sera lítil munur, og tí var tað harmligt at tað ikki eydnaðist at fáa sigurin heim.

Føroyski venjarin, Helgi W. Olsen, væntar, at Gefion fer at seta lið til kappingina aftur næsta ár, og at málið verður at fáa fleiri donsk lið at kappast í hesari kappingini. Við skiftinum hjá føroyska reiðskapsfimleikinum til at brúka altjóða fimleikareglurnar framsettar av FIG (Fédération Internationale de Gymnastique) liggur tað tó eisini væl fyri at lata føroysk lið kappast við í tílíkari kapping, til dømis føroyska landsliðið. Har skal tó eitt sindur til enn áðrenn tað ber til, tí kappast verður í øllum 6 reiðskapum (gólv, bogahestur, ringar, hestur, barr og rekk), meðan tað enn bert verður kappast í 3 reiðskapum (gólv, ringar, hestur) í føroysku kappingini. Nakað sum Helgi átti at verið sera góð orsøk at skipa umstøðurnar soleiðis, at vant og kappast verður í øllum 6 reiðskapum í Føroyum.



*Tað eydnaðist akkurát ikki hjá Helga W. Olsen at vinna donsku 2. deild við Nakskov, har føroyski fimleikarin virkar sum venjari*